# Fólkaligur tónleikur

*Ta› ver›ur ein blanda›ur bólkur vi› fleiri væl kendum føroyskum tónleikanøvnum, sum skal syrgja fyri upphitingini til konsertina uppi á Hálsi leygarkvøldi›*

JÁKUP MØRK



Komandi vikuskifti er sum kunnugt vikuskifti›, tá írsku fólkatónleikararnir »The Dubliners« koma til oyggjar okkara, har teir leygarkvøldi› skulu hava konsert í Ítróttahøllini á Hálsi.

Sum vera man hevur áhugin fyri konsertina veri› rættuliga stórur, og í Alive-Music, sum skipar fyri konsertini, eru teir rættuliga væl nøgdir vi› atgongumerkjasøluna.

### Blanda› upphiting

Sum vanligt er, tá konsertir av slíkum slag ver›a hildnar, so skulu ásko›ararnir hitast eitt sindur upp, á›renn stóru nøvnini trína á pallin.

Solei›is ver›ur eisini hesu fer›ina, og til at fáa rætta lagi› á ásko›ararnar, hevur Alive-Music fingi› fatur á fleiri tónleikarum, sum eru sera væl kendir her á landi, men sum vanliga ikki standa á sama palli í somu løtu.

Til samans ver›ur talan um 5 føroyingar og á odda fyri teimum stendur Finnbogi Lisberg, sum flestu føroyingar helst munnu kenna frá teimum løgum, sum hann hevur sungi› og givi› út seinastu árini.

Afturat sær hevur hann so fleiri a›rar kendar menn. Á harmoniku ver›ur Jógvan Olsen, sum vit annars mest kenna frá Hjarnum, at hoyra. Harafturat ver›ur kollfir›ingurin, Jens Marni Hansen, úr Kjølum at hoyra á guitara, umframt at hann eisini hjálpir Finnboga vi› sanginum.

Á guitara hoyra vit eisini Ólav Øster, sum í fleiri ár hevur veri› millum allarbestu guitarleikarar her á landi, og á bassstreingjunum ver›ur enn ein kendur føroyingur, nevnliga Pauli Magnussen úr m.a. Twilight. Ólavur og Pauli fara annars, eins og Jens Marni, at hjálpa til vi› sanginum.

Annars frættist frá fyrireikarunum, at tónleikurin, sum føroysku tónleikararnir fara at framføra, ver›ur fyri ta› mesta væl kendir føroyskir sangir. Hetta fyri at ta› skal ver›a gjørligt hjá flestu áhoyrarunum at syngja vi›, solei›is at stemmubondini skulu vera hita› væl og vir›iliga, á›renn írarnir koma á pallin.

### Gle›a seg

Frá gubbunum úr Dublin frættist annars, at tær eru rættuliga spentir upp á at koma henda vegin, hóast hetta ikki er fyrsta fer› teirra til okkara.

Ein bági tykist tó at vera vi› hesum, og er ta›, at tá teir komu henda vegin seinast, var talan um eina rættuliga buldrasliga flogfer›.

Flestu føroyingar munnu helst vita, hvussu ótespilig ein tílík fer› kann vera, men Dubliners, sum annars munnu hava roynt eitt sindur av hvørjum, gjørdust rættuliga skelka›ir ta fer›ina, og hava tískil ringt henda vegin fleiri fer›, fyri at kunna seg um, hvussu ve›urgudarnir skikka sær.

Gongst sum ætla, kemur bólkurin henda vegin fríggjakvøldi›, og fara teir tá beina lei› til Havnar, har teir skulu búgva á Hotel Føroyum. Leygarkvøldi› ver›ur so sjálv konsertin, og longu sunnumorgunin fara teir so av aftur landinum, vi› ta› at næsta konsert teirra á fer›ini ver›ur longu mánakvøldi›.

Sum nevnt, so eru rættuliga nógv atgongumerki seld, men enn eru nøkur eftir, og kunnu hesi keypast í forsølu fram til fríggjadagin.

# N‡ggj koyrikort draga út

*Arbei›i› at skifta út føroysku koyrikortini hevur tiki› longri tí› enn vænta›. Ta› ver›ur helst ney›ugt at leingja tí›arfreistina.*

Dánjal Højgaard

Um eitt ár skuldu allir bilførarar í Føroyum eftir ætlan havt n‡tt koyrikort. Tey gomlu koyrikortini skulu skiftast út vi› eitt n‡tt ES-líknandi koyrikort í seinasta lagi 31. desember 2000.

Men longu nú er greitt, at freistin fer neyvan at halda, og at onkur av okkum tískil fer inn í 2001 vi› tí gamla koyrikortinum.

Orsøkin er tann, at arbei›i› at skifta koyrikortini út hevur veri› meira umfatandi enn upprunaliga mett.

Higartil eru eini 15.000 n‡ggj koyrikort skriva›i út. Tá kunnger›in um umb‡ti av koyrikortum var› l‡st fyri fáum árum sí›ani var› mett, at tilsamans eini 25.000 koyrikort skuldu b‡tast um.




Eftir øllum at døma fer ta› ikki, at bera til at skifta tey seinastu 10.000 kortini út eftir bert einum ári. Tískil má freistin helst toyggjast naka›, sigur Jákup Jacobsen, stjóri á Bileftirlitinum.

Koyrikortini í Føroyum ver›a skift út eftir eini serligari mannagongd, sum Bileftirliti› umsitir.

*N‡ggja ES-líka koyrikorti. Her vi› mynd av Axel Nolsøe, fyrrverandi landsst‡rismanni*

# Móðir sjeystjørna – ein tónleikamynd

*Sjónleikur úr skaldsøguni við sama navni eftir William Heinesen*

Í Sambandi við, at William Heinesen hevði fylt 100 ár 15. januar 2000, heiðrar Gríma skaldinum við einum sjónleiki.

Egi Dam hevur skrivað nýggjan leik, bygdur á skaldsøguna »Móðir Sjeystjørna«.

Leikurin snýr seg í stuttum um tey afturvendandi fyribrigdini, ið W.H. viðger í skaldskapi sínum - tann ævigi bardagin millum lív og deyða, tað tímiliga og tað æviga, dreym og veruleika, og síðst, men ikki minst, um kærleikan og vónina, í allari sínari mangfoldigheit, lýst í gerandisdegnum hjá »vanligum« fólki í Havn.

Persónarnir eru »typir«, ið kennast aftur úr bókum Williams.

Tónleikur og rørslur eru týðandi partur av hesum leiki. Eisini á hesum øki, lata vit listamannin og tónaskaldið William Heinesen verða kveikjaran.

Leikarar eru:
Páll Danielsen, Hans Tórgarð, Birita Mohr, Ria Tórgarð, Katarina Nolsøe og Súsanna Tórgarð.
Leikstjóri er: Egi Dam
Scengraftur er abbadóttir Williams, Elisa Heinesen, ið hevur nomið sær scenografiútbúgving í London.

Tónleik og ljóð tekur Stamen Stanchev sær av. Talan verður um nýskrivaðan tónleik og fjølbroyttar ljóðmyndir, alt í anda Williams.

Bente Hansen, dansari úr Danmark leggur lag á rørslur.

Ljósdesignari er Árni Baldvinsson úr Íslandi.



*Tann 15. januar í ár eru 100 ár síðani, at William Heinesen var borin í heim og fyrireikingarnar eru nógvar til til dagin*

Árni, ið er sannur ljósmeistari, hevur í fleiri førum rætt okkum hond til ljósuppsetan. M.a. kenna vit hann frá leikum sum Dukkuheimið, Krabbasvalin, Sheyk og Dreymur Jóansøkunátt.

Sum ótroyttulig hjálparfólk til at seyma búnar, smíða pall og alt fyrifallandi arbeiði handan tjald eru David Geyti og Katrin Bonde.

Frumsýningin verður 15. januar 2000 kl. 20.00, sjálvan føðingardagin hjá Williami, í nýggju hølunum hjá Grímu á Gamla Meiarínum.

# Lærarar til samráðingar í dag

*Í dag fer Føroya Lærarafelag til samráðingarborðið, tí endalig semja spurdist ikki burturúr, tá Felagið og fíggjarmálastýrið seinast samráddust. Nýggja fólkaskúlalógin kostar sambært felagnum 18 milliónir eyka, men hesin peningur sæst ikki á fíggjarlógini*

DAGFINN OLSEN



*Elsa Birgitta Petersen, forkvinna Føroya Lærarafelags*

Hóast tað ikki sæst á fíggjarlógini fyri ár 2000, so hevur forkvinnan í Føroya Lærarafelag ikki mist vónina um lønarhækking og at fáa okkurt fyri eykaarbeiðið, sum nýggja fólkaskúlalógin hevur við sær.

Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, sigur, at hon ongantíð minnist, at lagt hevur verið uppfyri lønarhækkingum og slíkum á fíggjarlógini, tí hetta má metast, sum ein innbjóðing til feløg um at krevja meira.

Tískil hevur hon góðar vónir.

Hon sigur, at nú verður hildið fram, har tey sleptu seinast. Tá náddu partarnir til eina fyribils semju, ið gongur fram til 1. mars.

Elsa Birgitta Petersen hevur áður sagt við blaðið, at nú verður farið eftir restini og tað liggur tískil í luftini, at felagið hesaferð ætlar sær at fáa endaligt úrslit.

Um hetta so eisini merkir, at, at verkfallsrætturin verður nýttur, um semja ikki fæst, sigur søgan einki um.

Tá samráðingar seinast vóru, hótti Lærarafelagið við verkfalli og tað var fyrstu ferð í søguni, tí lærarar hava ikki havt verkfallsrætt, tí teir hava verið tænastumenn.

Teir lærarar, ið nú koma til, eru sáttmálasettir og hava verkfallsrætt.

# Føroyahúsið nógv á skránni

*Føroyahúsið í Keypmannahavn hevur ymiskt forvitnisligt á skránni í nýggja árinum og longu 8. januar byrjar skráin*

DAGFINN OLSEN

Nú aldarskiftið er farið aftur um bak, byrjar eisini nýggj skrá í Føroyahúsinum.

Ymiskt á skránni, hóast fíggjarstøðan ikki er so góð, sum vónað, og boðað hevur verið frá, at táttast má í.

Longu 8. januar byrjar skráin. Tá hevur kvinnubólkurin AGLOW fund.

### Litir og skap

Mánadagin 10. januar klokkan 19 skipar Kvinnufelagið fyri almennum fundi: Litspælið uttanum okkum og boðskapurin í tí. Lone Spohr, litráðgevi og innandurðaarkitektur, greiðir frá litum og týdningi teirra. Litir og skap. Pløgg-ini og lutir og litir heima senda út boð um teg og títt.

Atgongumerki kosta 40 krónur og øll eru vælkomin.

### Fotoframsýning

Tann 10. januar hevur fotografurin Gundur Follend Mikkelsen framsýning við fotomyndum. Hetta eru persónslýsingar og sýningin heldur fram til 21. januar.

Talvfelagið skipar fyri talvkappingini Vár Jákup frá 10. januar til 23. mars.

### William 100

Eisini í Keypmannahavn fara tey at gera burturúr, at skaldið Willim Heinesen var borin í heim fyri 100 árum síðani tann 15. januar. Á skránni er m.a. umrøða av skaldskapi Williams, sum bókmentafrøðingurin Bergur Hansen skipar fyri. Tóroddur Poulsen ber fram nýggjan „William Heinesen tekst“. Sunleif Rasmussen umrøður tónlist Williams og spælir. Annika Johansen lesur upp. Kinna Poulsen umrøður list Williams og Anniks Hoydal umrøður yrkingarnar og spælir úr nýggju fløguni við tekstum hjá William Heinesen. Eisini verður bókaframsýning og møguliga luttekur manskór.




*Føroyahúsið er á internetinum: www.faroehouse.dk*